Dagfest 25. mai 2023

# Tilmæli

## til landsstýriskvinnuna í heilsumálum

## frá leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum um at taka ímóti gávu at rinda fyri keyp av MR-skannara til Klaksvíkar sjúkrahús

Landsstýriskvinnan í heilsumálum hevur biðið leiðsluna í Sjúkrahúsverkinum um at gera tilmæli í málinum um at taka ímóti gávu at rinda fyri keyp av MR-skannara til Klaksvíkar sjúkrahús. Málið snýr seg í stuttum um, at advokatur umboðandi vinnulívsfólk í Klaksvík, Leirvík og Fuglafirði hevur sett seg í samband við stjóran á Klaksvíkar sjúkrahúsi, tí áhugi er fyri at lata eina peningagávu á 13. mió. kr. til Klaksvíkar sjúkrahúsi at rinda fyri keyp av einum 3T MR-skannara.

Fyri at hava eitt betur grundarlag til at taka støðu til nýggja skannaran, hevur landsstýriskvinnan vent sær til leiðsluna í Sjúkrahúsverkinum um eitt tilmæli, sum lýsir hvørja ávirkan ein slíkur MR-skannari á Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur heilsufakliga og fíggjarliga. Eisini ynskti landsstýriskvinnan at fáa leiðsluna at meta um, hvussu hetta samsvarar við yvirskipaðu strategiina fyri Sjúkrahúsverkið.

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum setti hin 4. mai 2023 ein arbeiðsbólk at lýsa og meta um hesar spurningarnar, ið settir vórðu. Fakliga tilmælið er lagt við sum fylgiskjal. Leiðslan hevur viðgjørt tilmælið og er samd um at mæla landsstýriskvinnuni til:

- At taka ímóti peningagávuni at rinda fyri keyp av 3T MR-skannara frá Siemens til Klaksvíkar sjúkrahús. Tað er tørvur á einum 3T MR-skannara í føroyska sjúkrahúsverkinum, sum fer at hækka diagnostiska støðið í Føroyum. Í Krabbameinsætlanini fyri 2022 mælir serfrøðingabólkur til, at fáa til vega slíkan skannara og í fleiri umførum hevur Landssjúkrahúsið víst á tørvin í sambandi við fíggjarlógararbeiði. Sum fakliga tilmælið vísir á, so fer at bera til at gera kanningar, sum vit í dag mugu gera uttanlands umframt, at 3T hækkar góðskuna á fleiri av teimum kanningum, sum verða gjørdar við 1,5T MR-skannara í dag.

- At biða Løgtingið um heimild at taka ímóti peningargávuni á 13 mió. kr. til MR-skannaran. Arbeiðsbólkurin metir tað er sannlíkt í mun til stýrisskipanarlóg og játtanarlóg, at heimild skal fáast frá Løgtinginum fyri at taka ímóti slíkari gávu.

Talan er um stórfingna gávu, men tað er ikki ókeypis fyri landskassan at seta upp og reka ein 3T MR-skannara á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum mælir tí landsstýriskvinnuni til:

- At fyrireika fíggjarlógarumbøn til Løgtingið um játtan á í fyrstu syftu 1,29 mió. kr. til umbygging av hølum, nýggja el-innføring og útbúgving av tekniskum starvsfólkum. Mett verður, at rakstrarkostnaðurin árliga verður áleið 1,74 mió. til MR-radiografar, serviceavtalu og streym. Víst verður annars til metingarnar í fakliga tilmælinum

Tað krevur útbúgving og royndir sum MR-radiografur at gera MR-skanningar. Tað finnast førleikar í Sjúkrahúsverkinum frammanundan, og fyri at tryggja neyðugu góðskuna verður mælt til:

- At landsstýriskvinnan í heilsumálum stuðlar leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum í at skipa *eitt* MR-toymi tvørtur um sjúkrahúsini. Tað merkir, at skipast skal eitt samstarv í millum

röntgendeildirnar á Landssjúkrahúsinum og á Klaksvíkar sjúkrahúsi við útbúgving og rotatiónsskipan, so starvsfólkini bæði í Tórshavn og í Klaksvík fara at skifta millum staðsetingarnar. Fyrimunurin við hesum er m.a., at tað longu eru starvfólk við MR-førleikum á Landssjúkrahúsinum, sum við stuttari upplæring í nýggja MR-skannaranum, kunnu gera dygdargóðar skanningar á Klaksvíkar sjúkrahúsi, meðan aðrir radiografar á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum eru undir útbúgving.

- At játtan verður sett av til tveir radiografar aftrat til MR-toymið í Sjúkrahúsverkinum.

Í mun til tær treytir sum gávulatararnir høvdu sett upprunaliga, so fekk Sjúkrahúsverkið hin 8. mai 2023 boð um, at hesar vóru tillagaðar soleiðis, at bert treytin um, at skannarin skuldi standa á Klaksvíkar sjúkrahúsi, var eftir. Eisini er tað eitt ynski – men bert eitt ynski – at at skannarin, um møguligt, ta tíð hann ikki er í nýtslu innan føroyska sjúkrahúsverkið, kann vera nýttur av øðrum skikkaðum persónum ímóti sámiligum nýtslugjaldi. Landsstýriskvinnan hevur alment sagt sína hugsan um málið, og vit í Sjúkrahúsverkinum hava ikki aðrar viðmerkingar til tann spurningin.

**Viðmerkingar í mun til strategiina fyri Sjúkrahúsverkið**

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum hevur eisini viðgjørt spurningin í mun til strategiina, sum er sett út í kortið. Nýggj tól, sum gera møguleikarnar fyri útgreiningum betri, eru við at menna okkara sjúkrahúsverk og flytur okkum nærri einum altjóða støði. Menningin innan heilsutøkni gongur skjótt, og møguleikarnir at viðgera, kanna og útgreina gerast betri og betri. Men medicoteknisk tól eru dýr, og ynskini er altíð størri enn fíggjarliga orkan og tí høpi er nýggi skannarin kærkomin.

Hetta slagið av skannara – 3T MR-skannarin – verður serliga brúktur sum ein elektivur skannari, t.v.s. til planlagt virksemi og ikki til akutt virksemi. Tað at 3 Tesla MR-skannarin er betur egnaður til elektivt virksemið enn til akutt, samsvarar eisini við politisku avgerðina um, at akutt virksemi í so stóran mun sum gjørligt skal vera á Landssjúkrahúsinum, meðan tað elektiva kann vera allastaðnis. Landafrøðiligu viðurskiftini hava við sær, at eisini Suðuroyar sjúkrahús má hava eina akuttfunktión.

Eitt annað av strategisku málunum hjá Sjúkrahúsverkinum er spurningurin um eina ætlan fyri kliniska staðseting í Sjúkrahúsverkinum. Í hesum liggur spurningurin um hvør sergrein skal liggja hvar og um dupultfunktiónir. Vit í Sjúkrahúsverkinum eru ikki farin undir hetta arbeiðið av álvara og tess heldur er nøkur niðurstøða gjørd. Tað er greitt, at ein gáva av hesum slag til eitt av sjúkrahúsunum hevur ávirkan á, hvør sergrein skal liggja hvar. Okkara fatan er tó tann, at skannarin hevur eitt so stórt virði fyri Sjúkrahúsverkið og sjúklingarnar í Føroyum, at vit sum leiðsla kunnu góðtaka at kliniska staðsetingin verður ávirkað í hesum føri.

Tað ber eftir okkara tykki til at fáa gagnnýtt skannaran væl við at skipa eitt serligt MR-toymi fyri Sjúkrahúsverkið, sum kemur at virka tvørtur um sjúkrahúsini. Tað verður ein roynd at sameina partar av røntgendeildunum á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar sjúkrahúsi í eina samstarvandi eind. Samstundis er hetta eitt slag av starvsfólkaumbýti millum sjúkrahúsini, ið eisini er eitt strategisk mál at fremja sameiningina.

Vinarliga

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo